VØGGUSTOVAN OG BARNAGARÐURIN Á KONMANSMÝRU

# Pedagogar

Vøggustovan á Konmansmýru søkir eftir 3 pedagogum at starvast millum 25 og 40 tímar um vikuna.
Eitt starv skal setast 01.12.2005 og tvey 01.01.2006 (ella eftir avtalu).
**Pedagogar, ið fáa prógv í vár eru vælkomnir at søkja.**

Lønin er sambart sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Vøggustovan er ein sjálvsognarstovnur við 35 børnum í aldrinum 1 til 3 ár. Vit hava 3 stovur og 3 til 4 starvsfólk á hvørjari stovu.

**Krøvini til tín eru:**

- At tú ert fyrikomandi og erligur.
- At tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ábyrgdarfult í samráð við børn og starvsfelagar.
- At tú heldur at arbeiði í einari vøggustovu er spennandi og avbjóðandi.
- At tú dugir at síggja avbjóðingar fram um avmarkingar.
- At tú er nærverandi og dugir at lurta.
- At tú vil verða við til at menna stovnin og arbeiða við tí vit seta okkum fyri.

Vit bjóða eitt áhugavert starv, har tú sleppur at verða við til at mynda títt egna arbeiði og gerandisdagin hjá børnunum. Vit liggja í einum spennandi umhvørvi tætt við Hoyvíkstjørn og sniðgøtunum á Konmansmýru.

Meira fæst at vita við at venda sær til leiðaran Katrin Bjarnadóttir ella álitisfólkinum Jóhannu Laksá á telefon 313131.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi seinast 15.11.2005.

**Vøggustovan á Konmansmýru**
Hoyvíksvegur 41 B
FO - 100 Tórshavn

SEV

# Elverkfrøðingar
## søkjast
## til
# Elfelagið SEV

Eitt fast starv og eitt tíðaravmarkað starv sum elverkfrøðingur eru leys at seta.
Meðan fasta starvið ikki er avmarkað í tíð, verður avloysarastarvið at seta til 1. september 2006 fyri verkfrøðing í farloyvi.

**Starvið:**
Talan er um størv innan býtisvirkini hjá SEV, sum umfata linjukervið, trafostøðir, innleggingareftirlit o.a. kring landið.

**Førleikakrøv:**
Kravt verður, at umsøkjararnir hava elektroverkfrøðingaprógv. Tað er ikki ein treyt, men fyrimunur, at viðkomandi hava arbeiðsroyndir innan nevnda arbeiðsøki.

**Setanartreytir:**
Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Verkfrøðingafelag og Fíggjarmálaráðið.
Tey, ið sett verða, skulu kunna góðtaka at verða flutt millum ymiskar uppgávur innan býtisvirkini og at skula ferðast kring landið eftir tørvi, við tað at býtisvirkini hjá SEV eru kring alt landið.
Arbeiðsstaðið er í Tórshavn, og verður arbeitt á og út frá hesum arbeiðsstaði.

**Nærri upplýsingar** um størvini kunnu fáast við at venda sær til Klæmint Weihe, stjóra ella Finn Jakobsen, deildarstjóra, báðir á tlf. 346800.

**Umsóknir** skulu saman við prógvum og møguligum ummælum sendast elfelagnum SEV, Postrúm 319, FO-110 Tórshavn, og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi tann 15. november 2005.

*Tórshavn, tann 26. oktober 2005.*
**Elfelagið SEV**

# ALV søkir eftir starvsfólki til handlistastovuna

**Vit síggja fegin at tú kanst**
- arbeiða við seymimaskinu, bindimaskinu og annað handaligt. Vit framleiða m.a. húgvur, troyggjur, taskur, jólating, páskapynt og mangt annað.

**Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum**
- at finna áhuga og førleika hjá næminginum. At kanna, menna, upplæra og geva næminginum vinnuligar royndir sum eru at javnmeta við vanlig arbeiðskor.
- talan kann vera um at arbeiða á øðrum eindum.
- at læra næmingin ymiskar uppgávur á handlistastovuni og vera við til at geva gerandisdegnum innihald.

**Førleikakrøv**
- viðkomandi útbúgving
- evnir at læra frá sær
- evnir at samstarva, eisini við aðrar fakbólkar
- dugir at síggja møguleikar heldur enn avmarkingar
- ert hugskotsfullur, kreativur og positivur

**Vit bjóða**
- spennandi arbeiði, har góðir møguleikar eru fyri ávirkan

**Løn og setanartreytir**
- starvið hevur tilvísing til deildarleiðaran
- løn sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið
- starvið verður at seta 1. des. 2005 ella skjótast tilber.

Meira fæst við at vita um starvið við at venda sær til: Guðrun Guðjónsson, deildarleiðari á tlf. 25 32 00

**Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 12. nov. 2005**
Umsókn saman við prógvi, royndarváttan v.m. skal sendast til:

Sjálvsognarstovurin ALV
Smiðjugerði 6. kj.
Postboks 301
110 Tórshavn

brævbjálvin skal viðmerkjast "umsókn"


ShapeWorks™
Independent Distributor

**Við hjálp frá shapeworks ber til at regulera tey óynsktu kiloini**

- einfalt og nemt
- orku og yvirskot
- úrslit



Tú fært alla tað vegleiðing og stuðul tær tørvar.

Um hetta ljóðar áhugavert, so ring fyri at hoyra nærri.

**Daniela & Willi Olsen**
TEL 42 23 67 · WWW.NYGGJANFIGUR.NU
*sjálvstøðugir Herbalife forhandlarar*


# Minningarhald

verður við Minnisvarðan í Fuglafirði 1. november kl. 14.00.

Frants Jensen, blaðstjóri, hevur bønarhald.

**Minnisvarðanevndin**


**Arbeiðshandskar**
*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo



# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480